# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Axel lagt frá sær sum gravari



*Axel Jacobsen hevur grivið við Selatraðar kirkju í 70 ár*

Týsdagin 11. desember skipaði Sjóvar kommuna fyri móttøku í Gamla Skúla (nú Missiónshúsinum) á Selatrað í sambandi við at Axel Jacobsen hevur lagt frá sær sum gravari við Selatraðar kirkju.

Axel, sum í dag er 83 ára gamal, byrjaði at grava saman við pápanum sum 13 ára gamal. Tá pápin doyði í 1960 tók Axel sær av at grava saman við bróðurinum Esbern Jacobsen. Esbern doyði 3. jóladag í 1982 og hevur Axel einsamallur røkt gravingina síðan tá. Tey seinastu árini hevur hann tó fingið hjálp frá soninum Jacob Mathias, umframt frá brøðrunum Hans, Jaspur og Jón Anthoniussen á Morskranesi. Eisini Jóhan Djurhuus hevur rætt Axeli ein hond.

Hátíðarhaldið byrjaði við at boðið var til ein kaffimunn við ris á l'amande og øðrum góðum.

Malena Thomsen borgarstjóri, ið hevur røtur á Selatrað, hugleiddi eitt sindur um tíðina sum barn á Selatrað. Hon takkaði Axel fyri tað trúfesti hann hevur sýnt, við at hava verið gravari í 70 ár. Sum tøkk fekk Axel handað eitt lummaur við áskriftini: „Takk fyri trúgva tænastu. Sjóvar kommuna 2007“

Johan Karl Djurhuus, sum er klokkari við Selatraðar kirkju, nýtti høvi at ynskja Axeli tillukku og visti eisini okkurt skemtiligt at siga frá.

Axel takkaði fyri at Sjóvar kommuna á henda hátt sýndi honum heiður. Hann greiddi eitt sindur frá arbeiðunum sum gravari.

Gamli kirkjugarðurin á Selatrað, ið var tikin í brúk í 1914, var innlagdur bøur og var ikki veltur til kirkjugarð. Tað kundi tí mangan verða stríggi at grava, og vóru ofta stórir steinar í vegin. Axel minnist serliga væl, tá hann skuldi grava fyri mammuni. Tá var ein stórur steinur, har gravast skuldi - so stórur at tað mátti borast og spreingjast. Fyri nøkrum árum síðani var kirkjugarðurin víðkaður.

At enda segði Hans Petur Jacobsen, formaður í Trivnaðarnevndini, nøkur orð.



*Malena Thomsen, borgarstjóri í Sjóvar kommunu, handar Axeli eina gávu*



*Axel við familju*

**Nýggjur luttakari á íløguøkinum í Føroyum**



Fondsmeklarafelagið Trelleborg byrjar nýtt íløguvirksemi í Føroyum. Saman við einum toymi við meira enn 20 ára royndum, fer Jan Jakobsen at standa á odda fyri okkara íløguvirksemi í Føroyum. Jan hevur í fleiri ár starvast á íløguøkinum.

Hevur tú spurningar ella ynskir at frætta nærri, ert tú vælkomin at seta teg í samband við økisleiðaran fyri Føroyar, Jan Jakobsen, á telefon 28 28 90.

Tú ert somuleiðis vælkomin at vitja heimasíðu okkara **www.fmstrelleborg.fo**

fmsTrelleborg

*Fondsmeklarafelagið Trelleborg bjóðar óhefta og fokuseraða íløguráðgeving. Felagið byrjaði sítt virksemi í 2006. Síðani stovnanina hevur fms Trelleborg havt góðan byr og umsitur vegna kundar fyri omanfyri 2,3 mia. kr.*



*Gerhard Jacobsen, kirkjuráðsformaður, Axel Jacobsen, og Malena Thomsen borgarstjóri í Sjóvar kommunu*